Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 218 - 13. november 2009

## Suu Kyi skal latast leys



Um vikuskiftið fara londini í Landssynningsasia at halda fund í Singapore, og í tí sambandi hava amerikanski forsetin, barack Obama, og forsætisráðharrin í Burma ella Myanmar, Thein Sein, avtalað at hittast sunnudagin. Hetta verður fyrstu ferð í 43 ár, at leiðararnir í teimum báðum londunum hittast. Á fundinum fer Obama at biðja hernaðarstýrið í Burma lata andstøðuleiðaran Aung San Suu Kyi leysa úr varðhaldinum. Hernaðarstýrið er í ferð við at fyrireika val til at velja nýtt tjóðarting, men andstøðan hóttir við at boykotta valið, verður leiðari hennara ikki latin leys.

## USA ikki til reiðar

Trupulleikar við at fáa Kongressina í Washington at samtykkja eina amerikanska veðurlagslóg kunnu lættliga enda við, at altjóða veðurlagsavtalan, sum ætlanin var at semjast um í Keypmannahavn í desember, má bíða til næsta ár. Tað sigur amerikanski samráðingarleiðarin í veðurlagsmálum, Todd Stern, við Washington Post. Amerikanskir embætismenn siga við blaðið, at orðini hjá Todd Stern merkja ikki, at USA fer at skáka sær undan sínum skyldum. Fyrrverandi varaforsetin Al Gore segði í gjár, at tað verður eitt vónbrot, um USA ikki er til reiðar at samtykkja eina altjóða avtalu á ráðstevnuni í Keypmannahavn.

# Føroyski fiskiflotin hevði 186 miljónir krónur í halli í fjør



**Tað gongur illa hjá føroyskari fiskiskipavinnu í løtuni. Árið í fjør var vánaligt, og smá útlit er til, at árið í ár verður nakað betri. Samanlagt hava allir skipabólkar hall – eisini teir bólkar, sum áður hava staðið seg hampiliga væl. Meðan heimaflotin okkurt árið hevur staðið fyri hallinum, gevur nú eisini verksmiðjuflotin og pelagiski flotin hall, um óvanligar inntøkur, sum eitt nú eru skipasølur, verða tiknar burtur úr**



*Bjarni Arnason og Jacobina í Lambanum stóðu fyri framløguni hjá Nota í gjár. Gongin hjá fiskiskipaflotanum er døpur, og smáar ábendingar eru um, at árið í ár verður nakað betri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SKIPAFLOTIN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Árið í fjør var eitt sera vánaligt ár hjá føroyska fiskiskipaflotanum. Samanlagt hevði flotin eitt hall upp á tilsamans 186,6 miljónir krónur, tá óvanligar inntøkur, sum eitt nú kunnu vera skipasølur, eru tiknar burtur úr. Tað, sum sermerkir árið í fjør, er, at eingin skipabólkur fekk raksturin at hanga saman. Tó er tað ikki so, at einki skip í ymisku bólkunum hevði avlop, men taka vit bólkin undir einum – eins og allar bólkarnar samanlagdar – góvu allir hall.

Úr rúgvuni kunnu vit nevna, at bert eitt trolarapar millum partrolararnar, sum eru við í greiningini, hevði avlop, og eisini hevði eitt av trimum rækjuskipum avlop. Raksturin hjá øllum garnaskipunum gav hall í fjør. Millum línuskipini eru eisini ógvuliga fá, sum kunnu vísa á avlop.

Eitt, sum kanska serliga fellir í eyguni, er, at teir bólkar, sum undanfarin ár hava havt góðan og rímiliga góðan rakstur, nú eisini góvu hall í fjør. Talan er um verksmiðjutrolarar og pelagisku fiskiførini.

Hetta vísir roknskapargreiningin, sum grannskoðaravirkið Nota hevur gjørt.

Nota er fyrrverandi Rasmussen & Weihe, sum fýra fylgjandi ár hevur staðið hesi greining.

Framløgan av hesi fimmtu roknskapargreiningini var í snotuligu hølunum hjá Norðoya Sparikassa í Miðlon seinnapartin í gjár, og hesaferð var tað Nota, sum stóð fyri framløguni.

Tað eru tey bæði, Bjarni Arnason, løggildur grannskoðari og Jacobina í Lambanum, grannskoðari, sum bæði í ár og undanfarin ár hava lagt fram úrslitini, sum felagið er komið fram til.

Grundarlagið undir greiningini eru almennar ársfrágreiðingar og roknskapir hjá teimum feløgum, sum eiga skipini. Aftrat hesum hevur Nota eisini fingið upplýst eitt nú veiðinøgd og nettosølu.

Við í greiningini eru øll fiskiskip, sum eru yvir 110 tons (línu-og garnaskip) ella hava eina maskinorku, sum er yvir 400 hk (trolarar), og hetta er sambært flokkingini av fiskiskipum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Útróðrarflotin er soleiðis ikki við í greiningini, og tað eru smærru trolbátarnir heldur ikki.

Nøkur av teimum størru skipunum eru heldur ikki við í greiningini. Hetta eru eitt nú skip, har roknskapirnir ikki eru atkomiligir, tí feløgini eru skipað soleiðis. Talan er eitt nú um partrolararnar, Polarhav og Stjørnuna, sum eru ogn hjá kommandittfelag.

### Stutt gjøgnumgongd

Taltilfarið, sum Nota legði fram í gjár, er rættiliga rúgvusmikið, og vit fara at venda aftur til greiningina í komandi viku.

- Vit hava lagt dent á at vísa gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki hesi fimm árini. Fyri at fáa eina heildarmynd av fiskiskipavinnuni, hava vit eisini valt at leggja tølini fyri allar skipabólkarnar saman. Dentur er lagdur á at geva lesarunum møguleikan at gera sínar egnu niðurstøður. Taltilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymiskar hættir.

Bjarni Arnason og Jacobina í Lambanum staðfesta í sínari niðurstøðu, at stórar broytingar eru farnar fram í okkara fiskiskipaflota árini, greiningarnar eru gjørdar (2004-2008).

- Sum heild hevur fiskiflotin havt eina framgongd árini 2004-2006. Síðan vendir gongdin til afturgongd í 2007 og 2008.

Tey siga í síni niðurstøðu, at framgongdin sum heild var stór í 2006, eins og afturgongdin hevur verið óvanliga stór í 2008, tá sæð verður burtur frá óvanligum postum, sum eitt nú kunnu vera skipasølur.

- Roknskapargreiningin fevnir ikki um 2009, men ábendingar eru um, at árið 2009 eisini verður eitt vánaligt ár hjá øllum skipabólkum samanløgdum. Sambært tølum, vit hava fingið frá Fiskimannafelagnum, er samlaða veiðivirðið í tíðarskeiðinum januar til september 2009, lækkað samanborið við sama tíðarskeiði í 2008.

Bjarni og Jacobina vænta tí, at vánaliga gongdin, sum var í 2008, fer at halda fram í ár.

### Skipaflotin

Í stuttu niðurstøðuni sigur Nota, at pelagisku skipini ikki høvdu serliga gott ár í 2004, men árini 2005-2007 gekk framá, og serliga í 2006 hevði flotin stóra framgongd. Í 2008 versnaði úrslitið tó munandi. Flotin